# NS Open rógvikapping verður í septembur

**Nevndin í Klaksvíkar Róðrarfelag hevði fund týskvøldið og á fundinum bleiv avgjørt, at innandura kappingin skal verða leygardagin 21. septembur, og sum navnið sigur, so kann ein og hvør luttaka**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Innandura rógvikappingin, sum Klaksvíkar Róðrarfelag skipar fyri verður leygardagin 21. septembur*
*Mynd: KRF*

**Klaksvík:** NS Open innandura rógvikappingin er tann fyrsta av sínum slagi nakrantíð í Føroyum, og nevndin í Klaksvíkar Róðrarfelag vónar, at undirtøkan fyri henni verður góð.

- Nú er hetta fyrstu ferð, at tað verður skipað fyri eini tílíkari kapping, so hetta verður allarhelst sum ein frumframførsla, har væntast kann, at onkrir feilir verða og byrjunartrupulleikar. Men tað kunna vit so vónandi læra av og harvið bøta um, tá ella um vit fara at skipa fyri eini Føroyameistarakapping í innandura rógving.

Hetta sigur Kristian Eli Zachariassen, formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag. Hann leggur afturat, at um hendan kappingin eydnast væl, so verður tað avgjørt skipað fyri eini føroyameistarakapping í innandura rógving.

Hann heldur, at ein føroyameistarakapping í rógving á maskinum kann verða við til at halda lív í kappróðrinum í vetrarhálvuni eisini, tí sum er, er kappróðurin ein summarítróttargrein, sum ikki er nógv at hoyra til um veturin. Hóast mong feløg byrja rættiliga tíðliga at venja til summarið.

### Kappingin

Eftir at hava kannað nøkur viðurskifti um, hvussu ein tílík kapping verður skipað uttanlanda, so hevur nevndin avgjørt, at luttakararnir í kappingini verða býttir í seks bólkar.

Ein verður fyri gentur undir 18 og ein fyri dreingir undir 18. Tey yvir 18 ár verða bólkað í tveir vektarbólkar í sama kyni. Tað vil siga kvinnur lættvekt og tungvekt og tað sama fyri menn. Vektarmarkið er fyri kvinnur 61,5 kilo, meðan tað fyri menn er 75 kilo. Tað vil siga, at um ein kvinna vigar 61,5 kilo ella minni, so hoyrir hon til lættvekt.

Kristian Eli sigur, at hvussu longi kappingin kemur at vara henda leygardagin, veldst fyri tað fyrsta um, hvussu nógvir luttakarar verða. Felagið hevur sett eitt minsta mark upp á tríggja luttakarar í hvørjum bólki. Um tað verða færri enn tað, so verður tað ikki róð í tí bólkinum.

Luttakararnir koma at rógva 2.000 metrar einaferð upp á tíð, og tann besti vinnur. Ein rógvari ger sum hann vil, hvar hann stillar mótstandin á maskinuni, tað veri seg lágt ella høgt ella bara í miðjuni. Men ein rógvari kann ikki broyta mótstandin eftir, at hann er byrjaður at rógva.

Rógvimaskinurnar, sum talan er um, eru tær so vælkendu Concept 2 rógvimaskinurnar, sum fleiri og fleiri róðrarfeløg í landinum hava útvegað sær seinastu árini.

Kristian Eli sigur, at honum vitandi, so eru tað sjey feløg í landinum, sum hava Concept 2 maskinur, og skuldi tað kunnað givið eina rímuliga góða og breiða undirtøku til kappingina.

- Fyribils hava vit avgjørt, at kappingin skal verða í venjingarhølunum her í neystinum, men um tað verða ov nógvir luttakarar, so hava vit møguleika til at flyta kappingina niðan í fimleikarhøllina, greiðir hann frá.

Hann sigur, at eitt tíðindaskriv verður orðað fyrsta dagin, og lagt út á heimasíðuna hjá Klaksvíkar Róðrarfelag og tað verður eisini sent út til fjølmiðlarnar.

Í tíðindaskrivinum fara allir upplýsningarnir um kappingina at standa. Tað vil siga, nær og hvar ein kann tekna seg, evsta mark fyri tilmelding, kostnaður og annað tílíkt, sum ein luttakari hevur brúk fyri at vita.

Tað fer at bera til at tekna seg umvegis teldubræv til Klaksvíkar Róðrarfelag og so eisini hjá tveimum av nevndarlimunum.

### NS Open

Kappingin ber heiti NS Open. Norðoya Sparikassi er høvuðstuðul í kappingini. Og tey, sum gera seg galdandi í kappingini fara ikki tómhent heimaftur. Nummar eitt, tvey og trý í hvørjum bólki fáa heiðursmerkir, umframt at vinnarin í hvørjum bólki fær 1.000 krónur.

- Hetta er gjørt fyri, at tað skal verða okkurt serligt til vinnaran. Og tað er ongin loyna, at hetta møguliga kann føra við sær, at kappingin verður sera hørð og harvið enn meiri spennandi, heldur Kristian Eli, sum at enda leggur afturat, at Klaksvíkar Róðrarfelag vónar, at rógvarar kring landið fara at taka væl undir við tí fyrstu innandura rógvikappingini av hesum slagi her á Føroya landi.

# Stevnuhýrur í Klaksvík hóskvøldið

**Sannur stevnuhýrur valdaði eina løtu í Klaksvík hóskvøldið, tá manningarnar á seksmannaførunum og tíggjumannaførunum hjá Aith Rowing Club úr Hetlandi og Klaksvíkar Róðrarfelag róðu kapp á 1.000 metrateininum í Klaksvík**

STUTTLEIKAKAPPING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Í allarfagrasta summarveðri fóru manningarnar skúmandi inn eftir vágni, meðan mong fólk stóðu á keiunum báðu megin og hugdu at. Eisini mundu tað vera mong, sum hugdu at kappróðrinum út gjøgnum vindeyguni hetta kvøldið.

Fyrst róðu seksmannaførini við monnum. Hetlendingarnir høvdu tvær mannfólkamanningar, so nakrir av manningini á Klaksvíkingi róðu fyrst við Páll Fanga, so at báðar manningarnar hjá Aith kundu fáa høvi til at rógva.

Páll Fangi við Klaksvíkingamanningini vann tann fyrsta róðurin, meðan tann hetlendska manningin vann á Páll Fanga monnunum, sum róðu beint aftan á hinar.

Síðani róðu kvinnurnar á seksmannaførunum og vunnu Klaksvíkskvinnurnar hendan róðurin. Seksmannafarið hjá hetlendingunum eitur Rippek. Hann líkist ikki serliga nógv einum føroyskum seksmannafari.

At enda róðu so tíggjumannaførini. Tann nýggi Klaksvíkingur móti tí gamla, sum í dag ber navnið Svartbakur. Klaksvíkingur vann hendan róðurin.

Nógvir bátar stimaðu aftan á bátunum, meðan teir róðu kapp. Sjálvt skúlaskipið Dragin sigldi aftur og fram millum róðrarnar. Hetta gav eitt gott høvi til at fylgja øllum róðrunum.

Tað var, sum sagt, heilt fitt av fólki savnað til at hyggja eftir kappróðrinum, og onkur helt skemtandi fyri, at Klaksvíkar Róðrarfelag átti at kravt inn, tí so høvdu tey fingið meira pengar inn enn á Norðoyastevnu í ár. Tí, sum fólk flest minnast, so var veðrið Norðoyastevnuaftan í ár út av lagi vánaligt við nógvum vindi og regni.

Eftir kappróðurin savnaðust rógvararnir og onnur til eina lítla hugnaløtu í neystinum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag til eitt kappróðrarprát.

Vónin hjá báðum feløgunum er, at tað kann fara at verða samband millum tey, so limirnir kanska kunnu vitja hvønn annan í framtíðini.



*Hetlendingar draga her tíggjumannafarið Svartbakur upp á land eftir venjing hósdagin á middegi*





Grein 19 nevnd kann kanna pengaflytingarnar hjá Anfinn Kallsberg:

# Tingið kann avgera lagnu løgmans

**Løgtingið hevur møguleika sambært grein 19 í stýrisskipanarlógini at seta eina nevnd av tingmonnum at kanna viðurskiftini viðvíkjandi Anfinn Kallsberg og Frostvirkinum til botns**

LØGMANSMÁLIÐ
*Eirikur Lindenskov*

Hóast málið um peningaflytingarnar hjá Anfinn Kallsberg langt síðani er fyrnað, og tí ikki verður tikið upp sum politimál, so eru ikki allar súður syftar enn.

Løgtingið hevur sambært grein 19 í stýrisskipanarlógini møguleika at seta nevnd »av tingmonnum at kanna alment umvarðandi mál«,

sum skrivað stendur í grein 19 í stýriskipanarlógin. Víðari stendur, at

»nevndirnar hava rætt at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins væl og frá almennum embætismonnum«.

Ger løgtingið av at seta slíka nevnd, so kann mistankin, sum reistur er um flytingarnar hjá Anfinn Kallsberg greiðast einaferð med alla.

Sosialurin hevur spurt Tórbjørn Jacobsen, sum hann fer at skjóta upp fyri tinginum at seta slíka nevnd.

– Hatta hava vit ikki viðgjørt, men kemur eitt slíkt uppskot fram á ting, so fari eg sjálvandi at atkvøða fyri tí, og tað vænti eg eisini, at allir hinir tingmenninir gera, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tjóðveldistingmaðurin heldur, at tá ivi verður reistur um habilitetin hjá fólki í landsins hægstu sessum, so eigur tað at verða viðgjørt og avgreitt.

– Fólkið hevur krav upp á at fáa at vita, hvør tað er, sum stýrir landinum, sigur hann.

Um stríðið millum seg og løgmann sigur Tórbjørn Jacobsen seg harmast um, at løgmaður brúkti løgmansembætið at verja seg við.

– Málið var eitt persónligt stríð millum meg og løgmann – og Jørgen Niclasen, sum kortini kom eitt sindur í bakgrundina. Men løgmaður brúkti løgmanssessin til at taka alla samgonguna sum gísla við at siga, at hetta var eitt álop á løgmansembætið. Tað var tað als ikki talan um, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann heldur, at løgmaður sambært stýrisskipanini hevur alt ov stórt vald.

– Hvat skuldi eg sum einsamallur tingmaður gera, tá løgmaður á henda hátt ger eitt persónsmál politiskt og tekur alla samgonguna sum gísla? Vit høvdu júst gjørt eina nýggja samgongu, og hana vildi eg sjálvandi ikki offra, sigur hann.

Verður uppskot lagt fram á ting, so er hugsandi, at tað verður samtykt. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava sagt, at málið eigur at verða loyst. Tekur Tjóðveldisflokkurin undir við at seta eina grein 19 nevnd, so verður málið helst samtykt – og so fæst greiða á, um løgmaður gjørdi nakað skeivt, tá hann flutti pengar frá Frostvirkinum til egnu feløg síni.



*Við eini grein 19 nevnd ber til hjá løgtinginum at koma til bonts við skuldsetingunum, sum Tórbjørn Jaobcsen reisti móti løgmanni um pengaflytingar hjá Frostvirkinum*

Sethúsini úti í Bakka:

# Byggingin farin í gongd aftur

**Eftir at býráðið hevur samtykt broytingar í byggisamtyktini fyri økið úti á Reyni í Havn, er eigarin av teimum nógv umtalaðu sethúsunum, sum standa á eini neystagrund, aftur farin til verka. Jan Christiansen, borgarstjóri, fegnast um, at samtyktin nú endaliga er broytt, og at fólk kunnu seta búgv í økinum**

BYGGING
*Stefan í Skorini*

Menn eru nú aftur farnir í gongd við at byggja eini sethús á eini neystagrund úti í Bakka. Hetta er eitt ár eftir, at farið varð undir byggingina upprunaliga. Ein klaga frá grannum hevði við sær, at byggingin steðgaði, men nú er líkt til, at eigarin endiliga kann flyta inn í húsini. Arbeiðsmenn eru í øllum førum farnir undir at gera húsini liðug.

Grannarnir vístu á, at hetta økið sambært byggisamtyktini hjá Tórshavnar Býráð varð kannað almennum stovnum og skrivstovum, og tí kundi býráðið ikki lata einum privatum persóni økið, so at hann kundi byggja sær eini sethús har.

Býráðið vísti á, at tað hevði gjørt eitt smávegis undantak frá byggisamtyktini, og tað var í lagi. Hesum vísti kommunudeildin í landsstýrinum aftur og kravdi, at byggingin skuldi steðga. Byggisamtyktin fyri alt økið skuldi broytast, um byggingin skuldi halda fram, segði kommunudeildin.

Fútabann varð síðani sett ímóti byggingini. Endin var, at Johan Mac Donald, eigarin av húsunum, var stevndur fyri rættin av býráðnum, sum sjálvt hevði givið honum loyvi at byrja við. Endamálið var at steðga byggingini.

*Menn eru aftur farnir til verka at gera nógv umtalaðu sethúsini úti í Bakka úti á Reyni í Havn liðug. Eitt ár er liðið, síðan farið varð undir at byggja hesi sethúsini*



### Broytt samtykt

Nú hevur Tórshavnar Býráð endiliga broytt byggisamtyktina fyri økið, og tí hevur eigarin fingið loyvi aftur at fara í gongd við at byggja.

– Maðurin hevur fingið loyvi at fara í gongd aftur, og landsstýrið hevur eisini góðkent broytingina í samtyktini, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Hann fegnast samstundis um, at samtyktin er broytt, so at fólk eisini fáa møguleika at seta búgv í økinum.

Broytingin í samtyktini sigur, at økið C4, har neystagrundin liggur, nú eisini kann fevna um bústaðarendamál.

Jan Christiansen sigur, at broytingin í samtyktini hevur ligið frammi til hoyringar hjá almenninginum, og at býráðið ikki fekk nakra beinleiðis klagu um tær. Tó fekk býráðið nakrar viðmerkingar frá grannum í økinum. Hann vísir á, at málið hevur tikið ómetaliga langa tíð, og tað er sera harmiligt.

– Ætlanin hjá okkum hevur allatíðina verið, at fáa fólk út í hatta økið at búgva, og tí er tað gott, at vit hava fingið broytt samtyktina, sigur borgarstjórin.

**Sagt verður frá, at Løgmansskrivstovan við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, at ásetingarnar fyri C4-økið, sum er ætlað almennum stovnum og skrivstovum verður broytt til eisini at fevna um bústaðarendamál.**

Byrsumaðurin á Sundsvegnum:

# Fongslingin longd

**39 ára gamli maðurin, sum leygardagin 13. juli hótti løgreglumenn við eini byrsu, skal fyri rættin fríggjadagin 16. august**

RÆTTARMÁL
*Stefan í Skorini*



*Maðurin, sum leygardagin 13. juli hótt løgregluna við eini byrsu, skal fyri rættin fríggjadagin 16. august, og tá hevur maðurin sitið í fongsli í meira enn ein mánað*

39 ára gamli maðurin hevur í samráð við sakførara sín góðtikið, at varðhaldsfongslingin av honum verður longd til fríggjadagin 16. august.

Varðhaldsfongslingin var annars úti í gjár, fríggjadagin, men av tí at kanningararbeiðið hjá løgregluni framvegis ikki er liðugt, er neyðugt at hava mannin sitandi í arrestini í eina viku afturat. Hetta góðtók maðurin uttan at fara í rættin fyri at mótmæla varðhaldsfongslingini.

### Skotið móti løgregluni

Tað var leygardagin 13. juli, at maðurin ringdi til vakthavandi á politistøðini. Hann hótti við at skjóta eftir fólki í grannalagnum og at taka lívið av sær sjálvum. Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka, tá hendingin fór fram.

Tá løgreglumenn komu á staðið, hótti maðurin við byrsuni, hann hevði í hondini. Hann skal sambært ákæruritinum hava latið skot av móti politinum.

Maðurin er ákærdur fyri tvey brot á grein 252 í revsilógini, tí hann hevur sett lívið hjá fólki í grannalagnum í vága við at hótta við byrsu.

Harumframt er hann ákærdur fyri at hava hótt løgreglumenn í tænastu og at hava latið skot av ímóti teimum.

Maðurin noktar seg sekan í ákærunum, tí hann sigur seg ikki minnast, hvat fór fram henda dagin.